inni - trygt og ómaksleyst til hús



### Sethús – Torkilsvegur 16, Sandavágur

Húsini eru í 2 hæddum á 120 m² - í alt 240 m². Grundøkið er 524 m². Byggiár: 1981. Øll yvirhæddin er dagførd í 2007. Tilfar til nýtt baðirúm og og nýggj vindeygu fylgja við. Húsini eru í góðum standi. Í neðra er inngongd / trappugongd, handilshøli, hjallur, 3 størri og minni, goymslurúm og baðirúm. Tekniskur streymur við eyka mátara er í niðastu hædd. Í erva er trappugongd / garderoba, gestawc, matarkøkur, stór borðsstova / stova við útgongd til altan, gongd, hjúnarrúm við klædnarúmi, baðirúm og 3 kømur. Runt húsini er snøggur garður / urtagarður við vøkrum trøum og runnum, 2 p-plássum og góð parkeringsviðurskifti. Húsini standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við frálíkum útsýni nær við barnagarð og vøggustovu. Góðir møguleikar eru fyri vinnuligum virksemi í niðaru hædd. Prísuppskot: kr. 1.300.000,00.



### Sethús – Uppsalagøta 70, Klaksvík

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd 345 fermetrar og harafturat er ein hjallur. Grundøkið er 1497 fermetrar. Byggiár: 1960/1990. Ymiskar umvælingar og dagføringar vóru gjørdar frá 1987-90. M.a var loftshæddin og øll miðhæddin gjørd av nýggjum. Húsini eru stoypt upp til takhædd, klødd við timbur og hava Icopaltak. Í miðhæddini er durur, wc, gongd, køkur og stova. Harafturat er eitt tøkt rúm á 61 fermetrar, sum kann innrættast til búøkið. Í ovastu hædd er stova, baðirúm, 2 kømur og hjúnarúm. Í niðastu hædd er kjallararúm, vaskirúm, fýrrúm og sláturrúm. Húsini hava sera gott útsýni yvir Borðoyavík og Klaksvíkina.



### Dygdarhús – Jørundsgøta 36, Klaksvík

Snøggu arkitektteknaðu húsini eru í 2 hæddum hvør á 120 fermetrar – í alt 240 fermetrar. Upprunaliga byggiárið er 1984, umbygd og dagførd í 1995. Húsini eru sera væl hildin og í góðum standi, og dygdin er avbera góð. M.a. er sjálvvirkandi ventilatiónsskipan, betondekk millum hæddirnar, og gólvini eru nýggj. Har er garaga, inngongd, durur, vaskirúm, gongd / trappurúm, fýrrúm / goymslurúm, baðirúm, ið er klárt at innrætta og 2 stór kømur. Í erva er trappugongd, matarkøkur við útgongd til útigólv / altan, 2 stovur, hjúnarrúm, baðirúm og kamar. Húsini standa í veðurgóðum umhvørvi nær miðbýnum og handilsgøtu, skúla og barnagarð. Har er gott grannalag og gott útsýni. Garður / utragarður er runt húsini og pláss til 2 bilar uttanfyri garaguna. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Sethús – Kelduskákið 8, Klaksvík

Húsini er í 3 hæddum – samlað búvídd uml. 270 fermetrar, og harafturat er garaga á 25 m². Grundøkið er 543 m². Byggiár: 1978. Loftshæddin er gjørd í 1984, og niðasta hædd varð innrættað í 1989. Fleiri umvælingatr og dagføringar eru gjørdar seinastu árini. M.a eru fleiri vindeygu og køkurin skiftur í 2005-2006. Í miðhæddini er durur, gongd, køkur, 2 stovur, hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur og hjallur. Í ovastu hædd er trappugongd, sjónvarpsstova, 2 kømurog wc. Í niðastu hædd er inngongd, durur, gongd, baðirúm, 2 kømur, garaga og vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm. Stórt tún og rimagarður við urtagarði er runt húsini eins og góð parkeringsviðurskifti. Húsini standa væl fyri við sera góðum útsýni yvir Klaksvíkina. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Sethús – Bakkavegur 41, Sørvágur

Húsini eru í 2 hæddum - ovara á 87m² og niðara á 37m² – í alt 124 fermetrar. Grundøkið er 552 fermetrar. Byggiárið er upprunaliga 1944, men húsini eru høvuðsumvæld í 2004, so alt er nýtt og væl bjálvað bæði uttan og innan í ovaru hædd. Í erva er útigólv, inngongd, durur / gongd, kamar, baðirúm, hjúnarrúm, nýggjur køkur, alrúm / borðstova / stova. arbeiðsrúm / kamar og niðurgongd til kjallara. Í neðra er vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm. Húsini standa í náttúruvøkrum og verðurgóðum umhvørvi við góðum sólargangi og hampiliga góðum útsýni. Prísuppskot: kr. 900.000,00.



### Ráðhús í gerð – Kollshjallar 3, Eiði

Húsini, sum eru liðug uttan, eru í 2 hæddum. Búðøkið er 144 m², og harafturat er bilhús við arbeiðsrúmi á 38 m². Húsini eru kløðd við rotfríum timbri, takið er úr aluminium, vindeygu og hurðar eru úr plast, og húsini hava hitapumpu. Innan er avskildrað, spartlað og klárt at mála, leggja á gólvini, seta køkin upp og seta upp fótlistar. Hurðar og allar hvítvørunar í køkinum eru við í søluni. Í neðra er inngongd, durur, gong, grovkøkur, køkur / alrúm / borðstova / stova, 2 kømur, baðirúm og loftstrappa. Í erva er sjónvarpstova, 2 kømur, hjúnarrúm og baðirúm. Gólvhiti er í durinum, baðirúmunum og í grovkøki. Húsini standa beint omanfyri Hotel Eiði og hava gott útsýni. Tey verða seld um hóskandi boð fæst.



### Sethús / 2 íbúðir – Bakkav. 43, Sørvágur

Húsini, ið eru í alt um 170 m², hava 2 sjálvstøðugar íbúðir – onnur á um 90 m² og hin á um 80 m². Húsini eru bygd í 80'unum, men umbygd og dagførd í 2007. Vestara íbúð er nýggj. Har er inngongd, durur / gongd, køkur / alrúm / borðsstova / stova, hjúnarrúm, baðirúm og kamar. Í eystaru íbúð er í neðra: inngongd, gongd / trappugongd, baðirúm / vaskirúm og 3 kømur. Í erva er køkur / alrúm / stova og wc. Húsini standa í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi og hava gott útsýni úr erva. Prísuppskot: kr. 975.000,00.



### Eigaraíbúð – Vesturgøta 11, 2.tv., Tórshavn

Í íbúðini, sum er 67 fermetrar til støddar, er køkur og stova í einum, 2 kømur, baðirúm og gongd. Harafturat er vaski- og goymslurúm í kjallara á 16 fermetrar. Íbúðin er høvuðsumvæld í 2002 við nýggjum køki, hvítvørum, baðirúmi, gólvi, lofti, listum og karmum. Íbúðin er væl hildin og í góðum standi og hevur sera gott útsýni yvir býin og alla Nólsoyarfjørð. Prísuppskot: kr. 1.500.000,00.



### Randarhús – millum Gilja 83, Hoyvík

Endarandarhúsini eru í 2 hæddum á 65 fermetrar - í alt 130 fermetrar. Grundøkið er 282 fermetrar. Byggiár: 1990. Húsini er væl bygd, væl hildin og í góðum standi. M.a. er nýtt tak og endaveggurin er klæddur av nýggjum. Í neðra er inngongd, durur, baðirúm, gongd / trappugongd, matarkøkur, vaskirúm / bryggers og stór borðsstova / stova við útgongd. Í erva er trappugongd / gongd, baðirúm, hjúnarrúm, baðirúm og 3 kømur. Húsini standa væl fyri í hugnaligum, friðarligum, tryggum og barnavinaligum umhvørvi og stutt er til spæli-pláss, dagstovn og busssamband.

Prísuppskot: kr. 2.000.000,00.



### Sethús – Hákunargøta 11, Hoyvík

Húsini eru í 2 hæddum - niðara á uml. 73 fermetrar og ovara á uml. 67 fermetrar - í alt uml. 140 fermetrar. Grundøkið er 516 fermetrar. Byggiár: 1991. Í neðra er inngongd, gongd / garderoba, gestawc, kamar, bryggers við egnari inngongd og køkur / borðsstova / stova. Í erva er trappupallur, hjúnarrúm, baðirúm við brús og kar, 2 kømur. Undir húsinum er krúpikjallari. Húsini standa í náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Fleiri splæipláss, dagstovnar og skúlar eru nærhendis, ferðslutryggar gøtur eru millum býlingarnar og stutt er til handils (FK). Hartil er felags antennuskipan, gott grannalag og sera gott útsýni út á Nólsoyarfjørð. Prísuppskot: kr. 2.300.000,00.



### Sethús – Gripsvegur 23, Tórshavn

Áhugaverdu sethúsini, ið standa sera væl fyri mitt í Havnini, eru í 2 hæddum á uml. 112 fermetrar - í alt 224 fermetrar. Byggiár: 1964. Húsini er væl hildin og í góðum standi. Í erva er hjallur, inngongd, durur, gongd, trappugongd til ovasta loft, køkur, grovkøkur / kovi, trappugongd til niðaru hædd, borðsstova, stova við útgongd til altan, baðirúm, hjúnarrúm og 3 kømur við innbygdum skápum. Í neðra er inngongd, gongd, fýrrúm / goymslurúm, vaskirúm og sjálvstøðug íbúð. Har er inngongd, gongd, matarkøkur, stova, hjúnarrúm, baðirúm og kamar. Runt húsini er garður / urtagarður og alt er snøgt og í góðum standi. Húsini standa væl fyri í veðurgóðum umhvørvi við góðum sólargangi og góðum útsýni. Hartil standa tey við høvuðsgøtu í virknum handils- og vinnuøki og eru eins væl egnað til vinnuligt virksemi og til bústað. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Sethús / íbúðarhús – Jónas Broncksgøta 32, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 74 fermetrar og kjallari á uml. 30 fermetrar – í alt uml. 178 fermetrar. Grundøkið er 213 fermetrar. Húsini eru upprunaliga bygd í 1932, men umbygd í 1952, høvuðsumvæld í 1990 og harafturat dagførd og viðlíkahildin so við og við, so tey nú eru í sera góðum standi. Í neðra er inngongd, durur / gongd, baðirúm, hjúnarrúm, køkur / alrúm / borðsstova / stova, arbeiðsrúm / kamar. Hartil er inngongd, durur / trappugongd, baðirúm til íbúðina í erva. Í erva er gongd, hjúnarrúm, 2 kømur, køkur / borðsstova / stova. Húsini standa væl fyri mitt í býnum við høvuðs- og handilsgøtu í veðurgóðum og hugnaligum umhvørvi við góðum sólargangi í urtagarðinum. Har er gott busssamband og stutt er til skúlar, barnagarðar, handlar og allan miðbýin. Prísuppskot: kr. 2.200.000,00.



### Virkis- og skrivstovubygningur – A. C. Evensensgøta 1, Tórshavn

Í ognini eru 1 bygningur A í 3 hæddum á 85 m², 1 bygningur B í 2 hæddum á 100 m² og millumbygningur á 50 m² - í alt 505 samanhangandi fermetrar. Grundøkið er 304 m². Byggiár: 1948, umbygd í 1978 og annars dagførd so við og við. Í niðara bygninginum er í miðhæddini inngongd, móttøka, køkur / alrúm og 2 stórar skrivstovur. Í ovastu hædd er trappugongd, 3 skrivstovur, fundarhøli og baðirúm. Í niðastu hædd er sjálvstøðug íbúð. Har er inngongd, durur / gongd, køkur, baðirúm, stova, 2 kømur og fýrrúm / vaskirúm. Í millumbygninginum er inngongd, gongd, forhøli og 2 arbeiðsrúm. Í erva er stór terassa og millumgongd. Í ovara bygninginum er í neðra inngongd / stór hurð, stórt framleiðsluhøli, goymslurúm og wc. Í ovaru hædd er inngongd, vaskirúm / verkstaður, durur, gongd / trappugongd, baðirúm, køkur, 1 stór skrivstova, 3 minni skrivstovur, 2 goymslurúm. Húsini, sum standa sera væl fyri 200 m frá Vaglinum í virknum fyrisitingarøki, er væl egnað til umsiting, vinnuvirksemi og/ella íbúðir og hava sera gott útsýni yvir Havnina og út á Nólsoyarfjørð. Prísuppskot: kr. 4.500.000,00.



### Summarhús – Hagavegur 20, Skálavík

Húsini eru í 2 hæddum á 60 + 20 fermetrar í alt 80 fermetrar og hartil er lágur kjallari. Upprunabyggiárið er ókent, men húsini eru bygd um og høvuðsumvæld í 2004. Alt er umvælt og dagført innan, men hildið í upprunasniðið. Túnið er komið í helvt, og restin av flísunum fylgja við. Húsini eru væl hildin og í góðum standi. Fólk hava búð fast í húsunum til í 2006. Í miðhæddini er inngongd, gongd, køkur / stova við brenniovni, kamar og baðirúm. Á loftinum er 1 kamar og hemsur. Í kjallaranum er fýrrúm / vaskirúm / kjallararúm. Húsini standa í friðarligum, barnavinaligum og veðurgóðum umhvørvi. Fleiri summarhús eru beint við, og barnagarður og skúli er 100m frá. Handil, pylsuvognur / kiosk og rúsa eru nærhendis, og gott skrubbumið er á molanum.



### Íbúðir, raðhús og vinnuhøli – undir Kongavarða við besta útsýni í býnum

Enn eru nakrar íbúðir og raðhús í støddunum 102 m² og 131 m² eftir til sølu. Harafturat eru nøkur vinnuhøli í stovuhædd á 130 m². Um tú vilt vita meira um íbúðirnar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel. 354200 & 520410.

## Vit hava stóran eftirspurning eftir húsum. Hevur tú hug til at selja?

## – Vinaliga, set teg í samband við okkum.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni